# Ísrael brúkti fosfor

Í fleiri vikur hevur Ísrael víst aftur skuldsetingini um, at landið brúkti fosfor í álopinum á Gaza-geiran, men um vikuskiftið viðgekk uttanríkisráðið, at herurin brúkti fosforbumbur í Gaza. Í samrøðu við bretska blaðið The Times segði talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum, Yigal Palmor, at herurin brúkti fosforbumbur. Hann segði, at herurin hevði bara fingið loyvi at brúka fosforbumbur á lógligan hátt, og at herleiðslan kannar skuldsetingar um, at bumburnar eisini blivu brúktar ímóti sivilum málum, tí tað var ikki ætlanin.



# Skulu landa á Svalbard

Russar arbeiða við einari ætlan um at lata ein part av russiska trolaraflotanum leggja fiskin upp í Barentsbuirg á Svalbard. Talan verður í høvuðsheitum um trolarar, sum royna nærhendis Svalbard, skrivar Fiskaren. Á einum tíðindafundi í síðstu viku kom fram, at virkið í Barentsburg verður projekterað í ár. Norski sýslumaðurin á Svalbard hevur vitað um russisku ætlanina leingi, men hann hevur ikki fingið nakrar formligar upplýsingar um málið, skrivar Svalbardposten.

# Mentanarkempur h



*Ebba Hentze fekk Mentanarvirðisløn Landsins fyri sítt stóra íkast til føroyskar bókmentir sum rithøvundur og týðari*

**Tað gjørdust Ebba Hentze, rithøvundur, og Martin Tórgarð, kvæðari, sum í gjár vórðu heiðrað við størstu mentanarvirðislønunum fyri teirra slóðbrótandi arbeiði fyri føroyska mentan**

MENTAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Størstu føroysku mentanarvirðislønirnar vórðu í gjár latnar Ebbu Hentze, rithøvunda og týðara, og Martini Tórgarð, kvøðara og kvæðakempu, sum fingu ávikavist Mentanarvirðisløn Landsins og Heiðursgávu Landsins 2008.

Tað var landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, sum landsins vegna handaði teimum báðum heiðurslønirnar.

Í røðu síni frøddist landsstýriskvinnan yvir at heiðra tveir av okkara slóðbrótarum, tá ið tað snýr seg um føroyska mentanarpallin. Tveir slóðbrótarar, sum alt teirra lív, uttan hóvasták, hava raðfest tað at arbeiða við og at skapa mentan – uttan tó, at teimum varð tryggjað nøkur løn aftur fyri, og ikki um at tala eftirløn, minti landsstýriskvinnan á.

## Bókmentaligur slóðbrótari

Í grundgevingini fyri at lata Ebbu Hentze Mentanarvirðisløn Landsins varð millum annað víst á hennara ótroyttiliga arbeiði fyri at hjúkla um føroyskar bókmentir og fyri at fáa føroyskar fagurbókmentir inn á bókmentapallarnar í øðrum londum.

Víðari varð sagt, at Ebba Hentze hevur ríkað føroyskar bókmentir gjøgnum eitt virkið lív sum rithøvundur og týðari. Hon hevur skrivað barnabøkur á altjóða støði, sum eru varðar í føroyskum bókmentum. Sum týðari hevur hon framt stórverk at fáa føroyskar bókmentir út í heim. Hon hevur enduryrkt føroyskar yrkjarar til fremmand mál, og hetta hevur hon megnað at gjørt uttan ta stóru lønina, men á so høgum støði sum bara



góðir yrkjarar kunnu gera.

Ebba Hentze hevur verið Føroyum og føroyskum bókmentum ein dyggur stuðul. Fyri hetta slóðbrótandi og góháhaldandi bókmentaliga starv varð veitt henni Mentanarvirðisløn Landsins.

## Kvæðakempa sum fáar

Heiðursgáva Landsins varð latin Martini Tórgarð fyri hansara arbeiði føroyska dansinum at frama sum kvøðari og kvæðakempa.

Í grundgevingini varð víðari víst á, at við listarligum gávum hevur Martin Tórgarð sítt serstaka dansi- og kvøðingarlag, soleiðis sum góðir kvøðarar altíð hava havt. Hann nýtir variatiónsmøguleikarnar í siðaarvinum á ein skapandi og

## Mentanarvirðisløn Landsins (kr. 150.000):

Í kunngerðini fyri at lata Mentanarvirðisløn Landsins stendur millum annað, at endamálið við at veita virðislønina er at heiðra føroyskt mentafólk sum tøkk fyri útint listarligt avrik, og til tess at kunna fáa Mentanarvirðisløn Landsins skal virðislønarevnið hava skapað listaverk á høgum støði.

**Yvirlit yvir móttakarar:**

2008: Ebba Hentze
2007: - eingin virðisløn latin
2006: Zacharias Heinesen
2005: Tita Vinther
2004: - eingin virðisløn latin
2003: Hanus Kamban
2002: Gunnar Hoydal
2001: Eyðun Johannessen
2000: Ingálvur av Reyni
1999: Jens Pauli Heinesen
1998: Regin Dahl



*- Eg tori at banna tykkum uppá, at ongin veit betur enn Ebba Hentze, hvussu tepran kost føroyska samfelagið bjóðar listafólkum sínum, ikki minst rithøvundum og týðarum, segði Carl Jóhan Jensen í bersøgnari røðu*